# Ein brølari



*Við ongum stigum og einum málmuni, sum vendir 399 mál skeiva vegin, hevur Tjaldur als ikki sannført um, at tær í løtuni hava nakað at gera í bestu kvinnudeildini*

**Hóast tað longu nú er mest sum 100% víst, hvør vinnur hvat í Sunset-kappingini, so skulu bæði leikarar og venjarar stríða seg ígjøgnum 7-8 dystir afturat, áðrenn heiðurskrónurnar kunnu handast**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Manskappingin endaði um vikuskiftið. Heiðursmerki og steyp vórðu handað, og eftirfylgjandi fingu spælararnir uttan iva loyvi at taka sær av løttum.

Undir vanligum umstøðum vildi kvinnukappingini eisini endað sama vikuskifti sum tann hjá monnunum, men soleiðis verður tó ikki í ár. Heldur ikki hóast tað við 99,99% vissu longu nú kann sigast, hvussu heiðursmerkini verða býtt, og hvat av liðunum endar á áttanda og aftasta plássinum.

Við sigrinum hjá VB á Stjørnuni skal ein sensatión av teimum stóru til, áðrenn tær hjá VB missa takið á gullinum. Silvurið er mest sum longu staðfest hjá Stjørnuni, og tað skal vilja illa til, um Neistin ikki heldur fast um triðja plássið, sum tær eru á í løtuni. Somikið vís er hendan raðfylgjan, at undirritaði gjarna setir ein kassa av - tí nú nærum forkunnuga - Sisu upp á spæl, um nakar hevur hug at halda nakað annað.

At Søljan verður nummar fýri, er eins vist, so einasti spurningurin – og hann í veruleikanum uttan týdning – er, hvussu raðfylgjan av VÍF, StÍF og Kyndil verður.

## Skeiv avgerð

Og tí er tað ikki bara spell, men beinleiðis óheppið og keðiligt, at kappingin í ár er víðkað upp í átta lið. Ikki endiliga tí at átta er eitt so keðiligt tal, og heldur ikki tí tað er hetta, sum hevur tikið spenningin úr kappingini. Tí ivaleyst vildi talan verið um somu einvísu - men spennandi - kapprenning millum VB og Stjørnuna.

Men tað er skeivt, at kappingin er víðkað, grundað á ein hálvan rossahandil, har » Tjaldur bjóðaði sær at taka uppskotið aftur, um teir fingu vissu fyri, at teir fingu ein uppflytingardyst ella at tað vórðu 8 lið í 1. deild kappingarárið 2004/05«, so sum formaðurin í HSF staðfesti í lesarabrævi í vikuskiftisútgávu okkara.

Tí hvussu fegin tey í Tjaldrinum enn vilja hava lið í bestu deildini, og hvussu stórt arbeiði tey enn leggja í at byggja felagið upp til nakað stórt, so er liðið enn ikki búgvið til at spæla í bestu deildini. Stigatalvan lýgur ikki, verður ofta tikið til, og sannleikin í ár tykist nærum ræðandi. Einki stig og ein málmun, sum er negativur við 399 málum! Tað svarar til at liðið hevur tapt hvønn dystin við 21 málum í miðal!

At formaðurin í HSF samstundis verjur avgerðina við, at »pláss skal vera fyri øllum« er bæði láturog grátuligt. Sjálvandi skal pláss vera fyri øllum, men ikki øll eiga pláss í bestu deildini. Kappingin er segmenterað júst við tí fyri eyga at finna rætta plássið til øll. Bestu liðini spæla í ovastu røðini og so framvegis...

Og lat tað verða sligið fast, at yvirritaði blaðmaður einki hevur ímóti Tjaldri sum so. Tað er bara ein staðfesting, at liðið í løtuni ikki hoyrir heima í bestu deildini. Og tað er stór synd fyri spælararnar hjá Tjaldrinum, sum høvdu havt eina munandi meira mennandi og spennandi hondbóltstilveru, um tær høvdu tikið lut í kappingini í aðru deild í ár, heldur enn at skula vera offur fyri einari avhølving fyri og aðrari eftir.

## Óneyðugur munur

Og hetta hevur gjørt, at styrkismunurin er vorðin óneyðuga stórur.

Sjálvandi vil ein ávísur styrkismunur altíð vera, og sjálvandi vilja tað altíð koma ár fyri, har eitt lið rennur undan øllum. Men tað er ongantíð áður komið fyri, at kappingin er vorðin so óneyðuga long, orsakað av einum klokkkláran brølara í sambandi við tilrættislegging av kappingini.

At tað eisini eru onnur viðurskifti, sum spæla inn í hesum. Til dømis at menninir ofta fáa ein lutfalsliga (ov?) stóran part av arbeiðs- og fíggjarorkuni í feløgunum, er ein royndur lutur. Men hetta kann á ongan hátt verja avgerðina, sum varð tikin undan hesum kappingarárinum. Tann avgerðin hevur í fyrstu atløgu viðført eina óneyðuga drúgva og óspennandi landskapping.

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 7 | 7 - 0 - 0 | 686 | 415 | 271 | 27 |
| 2 | Stjørnan | 7 | 6 - 0 - 1 | 581 | 407 | 174 | 25 |
| 3 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 565 | 425 | 140 | 18 |
| 4 | Søljan | 6 | 3 - 0 - 3 | 520 | 477 | 43 | 14 |
| 5 | VÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 469 | 460 | 9 | 9 |
| 6 | StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 442 | 532 | -90 | 7 |
| 7 | Kyndil | 6 | 2 - 0 - 4 | 397 | 545 | -148 | 7 |
| 8 | Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 295 | 694 | -399 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
MENN

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 8 - 0 - 2 | 584 | 527 | 57 | 24 |
| 2 | Kyndil | 10 | 6 - 0 - 4 | 614 | 504 | 110 | 20 |
| 3 | StÍF | 10 | 6 - 2 - 2 | 537 | 559 | -22 | 17 |
| 4 | H71 | 10 | 3 - 0 - 7 | 569 | 595 | -26 | 11 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 490 | 544 | -54 | 11 |
| 6 | Neistin | 10 | 2 - 1 - 7 | 561 | 626 | -65 | 8 |